# Nøvn

## Føðingar

14. mai fingu Jorita Winther Jensen, Tórshavn, og Janus Joensen, Sørvági, búsitandi í Keypmannahavn, eina dóttur. Hon vigaði 4068 gr og var 54 cm long.

15. mai fingu Hanna og Marner Jacobsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3500 gr.

17. mai fingu Óluva D. Nattestad og Mads Brandt Eriksen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2.670 gr.

19. mai fingu Klara Petersen Alex José dos Santos, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3220 gr.

21. mai fingu Sandra og Aleksandar Jovevic, Fuglafirði, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3950 gr.

22. mai fingu Marianna og Bjarni Fríðberg, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4130 gr.

22. mei fekk Áron ein lítlabeiggja, sum eitur Boas. Hann vigaði 3700 gr og var 52 cm langur. Foreldrini eru Marita og Filip Overby Sigh og búgva í Tórshavn.

23. mai fingu Rebekka Mikkelsen og Magnus Knudsen, Toftum, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3630 gr.

23. mai fingu Ioana og Daniel Rapa, Vestmanna, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4000 gr.

25. mai fingu Beinta og Edvard Jacobsen, Eiði, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3880 gr.

## Merkisdagar

**Konfirmatión**
Sunnudagin 30. mai verður Teitur Niclassen, sonur Anju Jacobsen og Jón Niclassen, fermdur á Aal kirke í Oksbøl. Dagurin verður hildin heima í Vestparken 85, 6840 Oksbøl.

**85 ára føðingardagur**
Mikudagin 2. juni verður Ásla Dam, Tórshavn 85 ár. Dagurin verður hildin á Hotel Føroyum, og eru tey, sum ynskja at heilsa uppá Áslu, vælkomin millum kl. 15.30 og 18.

**90 ára føðingardagur**
Sunnudagin 30. mai fyllir Sigurd Joensen í Oyndarfirði 90 ár. Dagurin verður hildin í Syðrugøtu, saman við børnunum.

**Diamantbrúdleyp**
Grundlógardagin 5. juni hava Nanny og Franklin Henriksen, Klajksvík, diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin á Klaksvíkar Sjómansheimi kl. 16 fyri innbodnum.

### Fyri 40 árum síðan:

## Stýrimenn og skipsførarar



Í apríl 1970 fingu 13 skipsførarar og stýrimenn prógv á Føroya Sjómansskúla.

Fremra rað f.v.: Herman Olsen, Rituvík, skipsførari, Torleivur Mikkelsen, Vestmanna, skipsførari, Ørvur Thomassen, Klaksvík, skipsførari, og Pauli Larsen, Porkeri, skipsførari,

Aftara rað f.v.: Mortan Johannesen, Tórshavn, stýrimaður, Regin Nónstein, Hvalba, skipsførari, Edvin Vestergaard, Vágur, skipsførari, Alvin Joensen, Vágur, stýrimaður, Asbjørn Heinesen, Klaksvík, skipsførari, Heini Vesturdal, Eiði, skipsførari, Jógvan Klakkstein, Klaksvík, skipsførari, Johan Christiansen, Tórshavn, skipsførari, og Páll Heinesen, Sørvágur, stýrimaður.

Myndaeigari: Jóhan Christiansen



## Sunrid í Smiðjuni

Ein framsýning hjá Sunrid í Gong letur upp í Smiðjuni í Lítluvík fríggjadagin 28. mai kl. 16.

Á framsýningini eru umframt grafisk prent, eisini fotomyndir og málningar. Sunrid, ið er útbúgvin fotografur og starvast sum fotografur, hevur gingið á kvøldskúla í grafikki og fæst í síni frítíð við at mála og gera grafiskar myndir. Í fjør hevði hon framsýning á mentunarvikuni í Runavík.

Mentunarnáttina er opið til kl 23. Framsýningin er opin til og við týsdagin 1. juni. Leygardagin er opið frá kl. 12 til 19 og sunnudag til týsdag frá kl. 15 til 19.